gult24 cyan24 magenta24 svart24



# FCK er tættari at DM



FCK vann týdningarmiklan dyst um vikuskiftið, og Todi og teir eru nú sera nær við gullmerkjunum, sum Brøndby tó eisini vil hava hendur á

**Todi og Zuma stóðu á odda fyri sannførandi FCK sigri í Århus, og nú er rættuligt trýst á Brøndby og Silkeborg**

SUPERLIGAN
*Jóannes Hansen*

Tað gongur sum eftir ánni hjá FCK og Toda Jónsson. Sunnudagin vunnu teir 3–0 í Århus. Todi Jónsson skoraði tvey tey fyrstu málini. Álopsfelagin hjá honum, Zuma, skoraði síðsta málið, og tað er eingin endi á positivu lýsingarorðunum, sum frá donsku pressuni skola niður yvir teir báðar útlendingarnar í FCK álopinum.

FCK sigurin sunnudagin var tann fyrsti í Århus í næstan fimm ár, og hetta var fimtandi dysturin upp í slag, at FCK fór av vøllinum uttan at hava tapt.

– Tað er ein fantastisk kensla at vera í felagnum. Tú kanst ætla, at tað er hugaligt at møta til venjingar mánamorgnar og at fara undir fyrireikingarnar til eina nýggja uppgávu, tá tað gongst so mikið væl í dystunum, heldur Todi Jónsson.

Todi heldur, at tað er akkurát nú, at hann er komin fyri seg eftir skaðan, sum fyrr í vár helt honum burtur frá besta liðnum í fleiri vikur:

– Eg havi kent tað soleiðis, at venjingarstøðan hjá mær ikki hevur verið tann sama, sum hon hevur verið hjá hinum. Men í Århus kendi eg meg vera væl fyri. Tá tað restaði eitt korter, setti Roy Hodgson Heine Fernandez á vøllin, og eg varð tikin út. Sjálvandi hevði tað verið stuttligt at skora hattrikk, men satt at siga, so hugsi eg ikki so nógv um, hvør skorar málini. Nú røður tað um hjá okkum øllum at hava eyguni fest á meistaraskapin. Vit rokna við, at tað ber til at vinna DM, og tað er spennandi.

Todi skoraði fyrsta málið í Århus, tá fyrra umfarið var 25 minuttir gamalt. Zuma snittaði við høvdinum eina langa sending víðari. Todi spurtaði framum miðverjuna og heilfluktaði hegnisliga bóltin framvið AGF málverjanum og í netið.

Eina lítla løtu undan steðginum økti Todi til 2–0. Thomas Thorninger, sum hesa ferð var miðvallari í høgru (hann hevur annars verið í vinstru nógvu tær seinastu ferðirnar), vann ein luftbólt, og Todi var fyrstur á leysa bóltinum, sum hann enn eina ferð fluktaði framvið málverjanum.

Zuma staðfesti rimmar avrikið, tá hann fór framvið AGF málverjanum og einum verjuspælara, áðrenn hann trillaði bóltin í tóma málið. Í onside sunnukvøldið vóru teir báðir á vikuliðnum, og í bløðunum er eingin ivi um, at Zuma og Todi í løtuni eru vandamiklasta álopsparið í superliguni.

Tá Roy Hodgson eitt korter undan leikloki valdi at spara Toda, var dysturin langt síðani avgjørdur.

– Tað kann gott vera, at tað verður nógv sagt og skrivað um teir, sum eru frammi á vøllinum, og sum leggja upp til og skora málini. Men at FCK er fremst í superliguni eru tað fyrst og fremst tvær orsøkir til. Onnur er, at vit fingu Roy Hodgson sum venjara. Hin er, at felagið í fjør keypti Jakob Laursen. Hann er fantastiskur í miðverjuni, har tað næstan ikki kemur fyri, at okkara lið ger mistøk, vísir Todi Jónsson á.

### Trýstið á hinum

Silkeborg var undan fjórði síðsta umfarinum á sama stigatali sum FCK. Sunnudagin var AB í Silkeborg. Teir vunnu 2–1. Sæð við føroyskum eygum var tað bæði gott og ilt. AB sigurin ber við sær, at teir nú eru átta stig frammanfyri Herfølge. Tað eru bara trý umfør eftir, og tískil hevði AB sigurin næstan við sær, at Herfølge fer at flyta niður.

Sæð við FCK eygum kom AB sigurin í Silkeborg væl við. Í gjár var FCk trý stig fremst. Brøndby, sum var fýra stig aftanfyri FCK, spældi í gjárkvøldið ímóti Lyngby. Brøndby var stórfavorittur.

Komandi vikuskifti skal Lyngby spæla í Parkini ímóti FCK:

– Lyngby hevur roynst sera vánaliga síðstu tíðina. Men tá teir spæla ímóti okkum, eru teir fullkomuliga hamskiftir. Tí verður tað ein sera torførur dystur, heldur Todi Jónsson. Hinir báðir dystirnir hjá FCK verða ímóti Brøndby í Parkini og í Odense.

Sunnudagin spældi OB á útivølli ímóti FCM. Úrslitið var 1–1, og Johan B. Hansen var ikki á liðnum hjá OB. Viborg vann 3–1 á HFK Sønderjylland. Søren Frederiksen, sum í fjør var við AaB á Tórsvølli, skoraði fyri Viborg í 3. og 24. minutti.

# Súni ger um seg

**Gøtumaðurin var millum teir fyrstu 11, tá Zwolle aftur vann sær ein sigur um vikuskiftið**

HOLLAND
*Jákup Mørk*

Eftir at tað í eina tíð mest sum hevur staðið í stað hjá Súna Olsen, tykist nú aftur at ganga fram á hjá unga gøtumanninum.

Fyri viku síðani hevði hann avgerandi leiklut sum innskiftur, tá Zwolle vann týdningarmiklan oddadyst, og hesa ferð var hann millum teir fyrstu 11, tá Zwolle á heimavølli tók ímóti BV Veendam, sum er statt niðarliga í røðini.

Súni spældi við fyrstu 75 minuttirnar av dystinum, og tá hann fór av vøllinum hevði hann verið við til at givið liði sínum eina 2-1 leiðslu, sum teir eisini megnaðu at halda dystin á tamb.

### Sær gott út

Zwolle hevur neyvan møguleika at røkka fremsta sessinum, sum gevur beinleiðis atgongd til bestu deildina, men við verandi gongd eru teir nærum vísir í at enda millum tey liðini, sum skulu dystast við niðaru liðini í heiðursdeildina um enn eitt pláss í deildini.

Úrtøkan hjá liðnum hevur verið stak góð seinastu tíðina, og í sonevndu perioduspølunum, sum tey hava fýra av í Hollandi, er Zwolle á odda í fjórða perioduspælinum. Allir perioduvinnararnir fáa sæti í upp- og niðurflytingarspælinum, og í løtuni er so einki av hinum liðunum, sum tykist vera eins vælkoyrandi og Súni og teir.

gult25 cyan25 magenta25 svart25



# Sogndal hølvað av

**Hvørki Julian Johnsson ella Kurt Mørkøre vóru við, tá Rosenborg vitjaði og vann 6–1, og nú ætla teir í Sogndal at keypa ein nýggjan álopsspælara**

NOREG
*Jóannes Hansen*

Í vikuskiftinum gekk tað út av lagi illa hjá føroyska felagnum í norskum fótbólti. Sogndal hevði vitjan av Rosenborg úr Tróndheimi, sum í fleiri ár hevur verið roknað at vera besta fótbóltsliðið í Norðurlondum.

Og tað spældi ikki væl av. Rosenborg fór avstað aftur við 6–1 sigri í viðførinum. Hetta er størsta avhølvingin, sum Sogndal leingi hevur lagt rygg til.

Besti spælarin hjá Sogndal, Tommy Øren, var á høkjum uttanfyri vøllin (hann breyt beinið mikukvøldið), og hvørki Julian Johnsson, sum nústaðni er farin at venja við fullari ferð eftir beinskaðan, ella Kurt Mørkøre vóru á vøllinum.

Og tað sær út til, at vánirnar hjá Kurt um at vinna plássið í Sogndal álopinum aftur, ikki eru góðar. Í vikuskiftinum hava teir í Sogndal sagt í norskum fjølmiðlum, at teir samráðast við Håvard Flo. Flo maðurin hoyrir til enska Wolverhampton, sum vil sleppa av við hann. Håvard, sum er systkinabarn við Jostein og Tor André, hevur røtur í Sogndal. Síðani hann fór úr Noregi hevur hann spælt við AGF og Werder Bremen, áðrenn hann kom til bretska felagið.

Svein Bakke, ítróttarstjóri í Sogndal, sigur, at avtalan um at keypa Håvard Flo kanska kemur upp á pláss, áðrenn Sogndal hósdagin skal spæla á útivølli ímóti Moss.

### Sorlið

Rosenborg kom í handa vending framum 2–0 í Sogndal. Eitt vet av spenningi kom í aftur, tá Sogndal minkaði um munin. Tað var vorðið sum mál, sum varð heilfluktað úr 25 metrum.

Men í 2. hálvleiki gjørdist munurin alt meiri eyðsýndur. Stórsigurin hjá Rosenborg hevði við sær, at teir komu á fremsta plássið í tippuliguni, sum teir so at siga hava havt patent upp á í fleiri ár. Undan hesum umfarinum var Viking Stavanger ovast, men teir megnaðu ikki at vinna á Ullevaal ímóti Lyn.

# Todi hugsar seg framvegis um



*Todi Jónsson hevur framvegis ikki gjørt av, um hann fer at taka lut í komandi landsdysturnum hjá Føroyum*

**FCK álopsmaðurin ásannar, at møguleikin fyri skaðum á landsliðnum gera tað trupult hjá honum at fylgja hjartanum**

LANDSLIÐSTOS
*Jóannes Hansen*

Landsdystirnir ímóti Sveis og Jugoslavia fyrst í juni nærkast. Tann fyrri verður spældur á Svangaskari leygardagin 2. juni, og tann seinni verður spældur á Tórsvølli 6. juni.

Í hesi vikuni fer Allan Simonsen at boða frá, hvørjar átjan spælarar hann vil hava at umboða Føroyar í hesum dystunum.

Ein av mest uppløgdu spælarunum á føroyska liðnum er Todi Jónsson. Síðst, hann var á landsliðnum, var á ferðini til Luksemburg og Russlands í mars. Ferðin hjá Toda endaði í Luksemburg. Har niðri fekk hann longu tíðliga í 1. hálvleiki ein herviligan vøddaskaða, sum hevði við sær, at Todi fór av vøllinum og ikki spældi við FCK í ein mánað.

Leiðslan íFCK gav ilt av sær. Teir søgdu seg ikki finna seg í, at teirra álopsspælari so ofta kom aftur til felagið og var skaddur, eftir at hann hevði umboðað Føroyar. Todi segði, at hann nú fór at umhugsa sína framtíð á landsliðnum, og at hann hevði góða tíð at hugsa seg um í, tí næstu dystirnir vóru ikki á skránni fyrrenn í juni.

Nú er juni í nánd, og sum sagt so skal landsliðsvenjarin í hesi vikuni velja sær manning.

Dagsskráin hjá Toda sær soleiðis út, at hann nú sunnudagin skal spæla við FCK ímóti Lyngby. Síðani eru tað landsdystirnir, sum eru á skránni. Tann seinni er mikudagin 6. juni, og sunnudagin 10. juni skal FCK spæla á heimavølli í Parkini ímóti Brøndby. Tað er væl hugsandi, at tann dysturin verður avgerandi fyri, hvør skal vinna DM, og fyri Toda Jónsson hevði tað verið ræðuligt ikki at verið førur fyri at spæla tann dystin.

Hevur tú tikið avgerðina, um tú fert at umboða Føroyar ímóti Sveis og Jugoslavia, ella um tú fert at senda avboð?

– Hatta er ein spurningur, sum eg havi hugsað nógv um. Eg eri ikki komin til nakra endaliga niðurstøðu., men tað skal eg koma til fyrrapartin av hesi vikuni. Eingin ivi skal vera um, at eg fegin vil spæla fyri Føroyar. Tað er nakað heilt serligt. Men á hinari síðuni eru tað skaðarnir og fótbóltsframtíðin. Tað gongur væl hjá FCK, og eg vil fegin vera við til at stríðast fyri at vinna DM. Eg orki ikki hugsanina, at eg enn eina ferð skuldi verið skaddur í landsdysti. Spurningurin er, um óttin fyri møguleikanum at verða skaddur hevur við sær, at sannlíkið fyri at verða skaddur, gerst størri. Eg veit tað ikki, men sum sagt, so fari eg í hesi vikuni at boða venjaranum frá, hvørja niðurstøðu eg eri komin til.

Hetta er tað, sum Todi Jónsson hevur at siga um henda spurningin akkurát nú. Seinni í vikuni fáa vit so at vita, hvørja niðurstøðu hann er komin til.

## Støðan, danska superligan

| | | dystir | v - j - t | vunnin mál | tapt mál | mál-munur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | FCK | 30 | 15-11- 4 | 50 | 25 | 25 | 56 |
| 2 | Viborg | 30 | 13- 7 -10 | 49 | 34 | 15 | 46 |
| 3 | Silkeborg | 30 | 14-11- 5 | 44 | 31 | 13 | 53 |
| 4 | OB | 30 | 12- 7 -11 | 46 | 39 | 7 | 43 |
| 5 | Lyngby | 29 | 11- 7 -11 | 36 | 46 | -10 | 40 |
| 6 | HFK Sønderj. | 30 | 1 - 7 -22 | 27 | 78 | -51 | 10 |
| 7 | Herfølge | 30 | 5 - 9 -16 | 37 | 60 | -23 | 24 |
| 8 | FCM | 30 | 13-10- 7 | 46 | 40 | 6 | 49 |
| 9 | Brøndby | 29 | 15- 7 - 7 | 66 | 36 | 30 | 52 |
| 10 | AGF | 30 | 11- 4 -15 | 44 | 56 | -12 | 37 |
| 11 | AB | 30 | 6 -14-10 | 37 | 40 | -3 | 32 |
| 12 | AaB | 30 | 11-10- 9 | 47 | 44 | 3 | 43 |

## Støðan, danska 1. deild

| | | dystir | v - j - t | vunnin mál | tapt mál | mál-munur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | Vejle | 26 | 13- 8 - 5 | 61 | 32 | 29 | 47 |
| 2 | Skive | 26 | 7 - 8 -11 | 43 | 61 | -18 | 29 |
| 3 | Randers F. | 26 | 9 - 6 -11 | 37 | 45 | -8 | 33 |
| 4 | Ølstykke | 26 | 6 - 5 -15 | 30 | 70 | -40 | 23 |
| 5 | Køge | 26 | 15- 7 - 4 | 55 | 29 | 26 | 52 |
| 6 | Hvidovre | 26 | 9 - 8 - 9 | 48 | 45 | 3 | 35 |
| 7 | Fremad A | 26 | 5 - 7 -14 | 34 | 54 | -20 | 22 |
| 8 | Frem | 26 | 15- 7 - 4 | 60 | 28 | 32 | 52 |
| 9 | FC Aarhus | 26 | 5 - 8 -13 | 32 | 61 | -29 | 23 |
| 10 | Farum | 26 | 13- 5 - 8 | 52 | 35 | 17 | 44 |
| 11 | Esbjerg | 26 | 17- 7 - 2 | 68 | 21 | 47 | 58 |
| 12 | Brønshøj | 26 | 12- 2 -12 | 49 | 52 | -3 | 38 |
| 13 | Birkerød | 26 | 2 - 4 -20 | 33 | 69 | -36 | 10 |
| 14 | B93 | 26 | 12- 3 -11 | 46 | 38 | 8 | 39 |
| 15 | B 1913 | 26 | 9 - 8 - 9 | 32 | 38 | -6 | 35 |
| 16 | AC Horsens | 26 | 8 -10- 8 | 33 | 35 | -2 | 34 |

## Støðan, norska tippeligan

| | | dystir | v - j - t | vunnin mál | tapt mál | mál-munur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | Viking | 8 | 6 - 2 - 0 | 18 | 7 | 11 | 20 |
| 2 | Tromsø | 8 | 2 - 0 - 6 | 5 | 14 | -9 | 6 |
| 3 | Strømgodset | 8 | 0 - 3 - 5 | 9 | 24 | -15 | 3 |
| 4 | Stabæk | 8 | 5 - 1 - 2 | 12 | 8 | 4 | 16 |
| 5 | Sogndal | 8 | 2 - 0 - 6 | 7 | 19 | -12 | 6 |
| 6 | Rosenborg | 8 | 7 - 0 - 1 | 27 | 8 | 19 | 21 |
| 7 | Odd. Grenl. | 8 | 4 - 2 - 2 | 14 | 8 | 6 | 14 |
| 8 | Moss | 8 | 4 - 1 - 3 | 11 | 11 | 0 | 13 |
| 9 | Molde | 8 | 4 - 2 - 2 | 18 | 9 | 9 | 14 |
| 10 | Lyn | 8 | 1 - 3 - 4 | 9 | 12 | -3 | 6 |
| 11 | Lillestrøm | 8 | 5 - 1 - 2 | 14 | 11 | 3 | 16 |
| 12 | Bryne | 8 | 2 - 1 - 5 | 10 | 16 | -6 | 7 |
| 13 | Brann | 8 | 4 - 1 - 3 | 17 | 14 | 3 | 13 |
| 14 | Bodø/Glimt | 8 | 1 - 1 - 6 | 6 | 16 | -10 | 4 |

## Støðan, hollendska toto-deildin

| | | dystir | v - j - t | vunnin mál | tapt mál | mál-munur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | Den Bosch + | 33 | 22- 6 - 5 | 62 | 25 | 37 | 72 |
| 2 | Excelsoir + | 33 | 19- 6 - 8 | 84 | 62 | 22 | 63 |
| 3 | FC Zwolle | 33 | 17-10- 6 | 70 | 41 | 29 | 61 |
| 4 | Cambuur/L. | 33 | 15- 9 - 9 | 54 | 48 | 6 | 54 |
| 5 | G.A. Eagles | 33 | 16- 5 -12 | 61 | 61 | 0 | 53 |
| 6 | Telstar | 33 | 15- 7 -11 | 46 | 47 | -1 | 52 |
| 7 | Volendam + | 33 | 15- 5 -13 | 54 | 47 | 7 | 50 |
| 8 | Helmond Sp. | 33 | 13- 9 -11 | 67 | 47 | 20 | 48 |
| 9 | Eindhoven | 33 | 12- 8 -13 | 57 | 56 | 1 | 44 |
| 10 | Top/Oss | 33 | 13- 3 -17 | 55 | 65 | -10 | 42 |
| 11 | Dordrecht ‘90 | 33 | 10-10-13 | 58 | 57 | 1 | 40 |
| 12 | BV Veendam | 33 | 11- 6 -16 | 52 | 65 | -13 | 39 |
| 13 | Heracles A. | 33 | 10- 9 -14 | 37 | 51 | -14 | 39 |
| 14 | Emmen | 33 | 10- 8 -15 | 51 | 63 | -12 | 38 |
| 15 | MVV | 33 | 11- 4 -18 | 42 | 57 | -15 | 37 |
| 16 | Haarlem | 33 | 8 -10-15 | 45 | 59 | -14 | 34 |
| 17 | ADO Den Haag | 33 | 8 - 9 -16 | 48 | 69 | -21 | 33 |
| 18 | VVV | 33 | 8 - 4 -21 | 37 | 60 | -23 | 28 |